

*45 ára gamla Nina Magnussen er borin í heim við cystiskari fibrosu og er elsti føroyingur nakrantíð, ið hevur livað so leingi við sjúkuni*

# Sjúk fyri lívið

**Nina Magnussen er borin í heim við cystiskari fibrosu og hevur alt sítt lív verið darvað av sjúkuni. - Um tú ert vaksin upp við sjúkuni, veitst tú sjálvandi ikki, hvussu tað er at liva uttan. Men tað er ikki altíð lætt at liva, sigur Nina, sum í dag er 45 ára gomul og elsti føroyingur nakrantíð, ið hevur livað so leingi við sjúkuni**

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Nina ber kroppin hjá sær saman við ein bil, har ein rúgva er í ólagi:

– Eitt nú um karburatorurin á einum bili er tiptur, trekkir bilurin ikki væl. Og so lekur hann kanska eisini kølaraløg, olju og annað. Bilurin kann koyra, men skal alla tíð steðga og kannast. Júst soleiðis er kroppurin hjá mær. – Hann koyrir, men bara ikki skjótt og leingi í senn, sigur 45 ára gamla Nina Magnussen.

## Sjúkan fremmand

Tá Nina Magnussen varð fødd, visti eingin um sjúkuna, cystiska fibrosu:

– Eg var sera illa fyri, tók ikki uppá og megnaði ikki at halda matin inni í mær. Tískil varð eg at kalla innløgd á sjúkrahúsi, til eg var fimm ára gomul. Nústani tá staðfestu læknarnir, at eg hevði cystiska fibrosu, greiðir Nina frá.

## Beiggin eisini sjúkur

Tá Nina var trý ára gomul, fekk hon ein beiggja, ið eisini varð borin í heim við sjúkuni. Hann var nógv verri fyri enn Nina og doyði sum 11 ára gamal:

– Eg var ung og óbúgvin, tá beiggi mín doyði, og hugsaði ikki, eg kundi doyggja eins tíðliga og hann. Eg misti ein góðan vin og sakni hann enn, men serliga var tað hart fyri foreldrini, sigur Nina og leggur afturat, at tá var tað ein deyðadómur at hava cystiska fibrosu:

– Mamma fekk rætt og slætt at vita, at hon fór at missa bæði børnini. Men eg var ikki so álvarsliga sjúk í lungunum sum beiggi mín, og tí kláraði eg tað.

Sama árið, beiggi Ninu doyði, fekk hon eisini sukursjúku, og tá gjørdist alt verri. Men so við og við, sum læknarnir vistu meira um sjúkuna og nýggjur heilivágur kom, fingu foreldrini hjá Ninu tó at vita, at Nina fór at liva longri enn beiggin og møguliga at gerast vaksin:

– Heilivágurin er mentur ótrúliga nógv síðan tá, og tí livi eg enn. Men somuleiðis havi eg havt foreldur, ið við skynsemi og góðum innliti í sjúkuni hava ansað eftir mær. Men eg havi tó verið innløgd 14 dagar fýra ferðir um árið á Ríkissjúkrahúsinum, síðan eg var 16 ára gomul.

## Elsti føroyingur

Í dag er Nina elsti føroyingur á lívi við cystiskari fibrosu. Somuleiðis er hon millum tey elstu í Danmark, sum hava sjúkuna. Tey flestu, sum eru eldri enn hon, hava fingið nýggj lungu:

– Tað er ikki lætt at gera eina lungatransplantatión, og ein slík viðgerð er avgjørt seinasti útvegur. Nógv doyggja eisini undir ella beint eftir transplantatiónina. Míni lungu virka enn, men eg leggi tó til merkis, at tey eru verri nú enn áður. Eitt nú havi eg altíð elskað at kvøðið og skipað, men tað seinna megni eg ikki longur. Eg virki og megni eitt nú at ganga upp gjøgnum nógvar trappur sjálv, hóast eg hvíli meg á vegnum.

## Óttast ikki beinleiðis deyðan

Dagliga hugsar Nina ikki nógv um deyðan. Men onkuntíð, tá hon fær eina álvarsama infektión og einki megnar, hugsar hon tó, hon ikki fer at liva meira:

– Tá eg var yngri, helt eg ikki, eg fór at liva, til eg varð 30. Øll hini við sjúkuni doyðu rundan um meg, og so hugsaði eg sjálvandi, nær tað varð mín túrur. Eg verði ikki 100 ára gomul, men við góða heiliváginum, havi eg vónir um at liva nøkur ár afturat.

– Eg havi sæð nógvar sjúklingar við cystiskari fibrosu, ið hava verið deyðanum nær. Tað er ein ótespilig sjón, og tí ynski eg veruliga, at eg doyggi skjótt og lætt, tá mín túrur kemur. Men við sjúkuni gongur tað vanliga rættiliga skjótt fyri seg, tá fyrst gongur undan, sigur Nina, ið vanliga ikki gremur seg, men heldur gleðist um, at hon eftir umstøðunum hevur tað gott.

## Ikki fyri ongum

Hóast Nina hevur baksast við sjúku alt sítt lív, hevur hon tó ikki bert sitið hendur í favn. Nina hevur nevniliga fingið sær eina útbúgving sum lívfrøðingur á Lærda Háskúlanum í